# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Leiting tryggjað í seks ár

Í vikuni lat landsstýrismaðurin í vinnu/oljumálum trý nýggj leitiloyvi á landgrunninum. Við hesum loyvum er leitingin tryggjað í seks ár aftrat vísti landsstýrismaðurin á í samrøðu við Rás2/Sosialin. Hann vónaði, at leitingin fer at føra til, at kolvetni í rakstrarverdugum mongdum verða funnin í framtíðini.

Vit kunnu fegnast um, at tað framvegis eru mong stór og minni oljufeløg, sum raðfesta føroyska landgrunnin í sínum leitiskráum. Hóast talið av feløgunum er minkað síðani fyrstu útbjóðingina fyri átta árum síðani, so eru tó mong positiv tekin. Olju- og gassfeløg sum ENI, StatoilHydro, Chevron, OMV og DONG eru tungvektarar hvør á sínum øki. Øll eru tey virkin vestan fyri Hetland eisini, og nettup henda sannroynd, at feløg hava valt sær alt Atlantsmótið sum fokusøki, er nakað, ið føroyskir kolvetnismyndugleikar eiga at fegnast um. Leiting øðrumegin markið smittar av uppá leitingina hinumegin markið.

Tí er rætt av okkara myndugleikum at fylgja sera væl við tilgongdini vestan fyri Hetland. Tær verkætlanir, sum verða settar út í kortið har, kunnu uppá sikt ávirka virksemið á føroyska landgrunninum rætta vegin. Franska olju- og gassfelagið Total er í ferð við at leggja til rættis eina útbyggingarætlan fyri fyrstu veruligu gassframleiðsluna á Atlantsmótinum. Danska Dong, sum serstakliga er eitt gassfelag, er við í hesum ætlanum og er annars tað felagið, sum hevur flest loyvi vestan fyri Hetland. Áhugin fyri Føroyum er eisini nær tengdur at júst møguligum gassgoymslum her. Væntandi verða stórar avgerðir tiknar í komandi tíð um fleiri útbyggingarætlanir vestan fyri Hetland. Fyribils er talan um gassútbygging á Laggankelduni hjá Total og útbygging av tveimum oljukeldum, Cambo hjá Amerada Hess og Rosebank hjá Chevron. Verða allar hesar ætlanir til veruleika, so verður infrastrukturin nógv útbygdur og harvið verða brýr bygdar til møguligar olju- og gasskeldur á føroyska landgrunninum.

Hetta er tað áhugverda senariu, sum stendur fyri framman. Og hetta eigur eisini at gera tað meira hugaligt fyri ENI at bora í 2009 og hjá StatoilHydro og Chevron at bora í 2010 – leitibrunnar inni á føroyska landgrunninum. Føroyskir oljumyndugleikar eiga at fylgja eyka væl við gongdini vestan fyri Hetland komandi tíðina, nú hon kann gerast ein týðandi brikkur í tí føroyska kolvetnispuslispælinum eisini.

Alt hetta kundi bent á, at tað ganga kanska ikki so nógv ár, áðrenn oljuprátið her heima verður meira ítøkiligt. Tað átti eisini at fingið avvarðandi myndugleikar at sett hol á kjakið ella viðgerðina av teimum avleiðingum, positivum og negativum, sum kunnu fara at standast av eini øktari oljutilgongd. CHE samgongan valdi at gera hetta til part av sínum samgonguskjali. ABC vil heldur taka tað, sum tað kemur. Okkara ráð til fólkini í Tinganesi er longu nú at gera hetta mál til ein ítøkiligan part av arbeiðinum hjá t.d. Vinnumálaráðnum/Jarðfeingi um okkara oljuframtíð.

**Sosialurin**

**Billy Graham:**

## Logar uttan tamarhald

**SÍMUN PAULI JACOBSEN**



Fyri nøkrum árum síðan var skógareldur í fjøllunum stutt frá heimi okkara. Tað vóru skógarvaktarmenn, sum vóru á varðhaldi í 24 um samdøgurið, sum fyrst sóu eldin. Men tá var eldurin longu vaksin so nógv, at ein ikki hevði tamarhald á honum longur. Hann nærkaðist skótt heimi okkara, og vit vórðu biðin um at rýma við stytstu ávaring. Tað komu sløkkiliðsmenn og vit bardust móti eldinum alla náttina. Endiliga fingu vit so tamarhald á honum.

Heimur okkara stendur í loga og menniskja uttan Gud vil ongantíð fáa tamarhald á loganum. Tað sær út til, at vit verða noydd móti Harmageddon.

Stutt áðrenn Dag Hammerskjøld læt lív í eini flogvanlukku fyri nøkrum árum síðan, vitjaði eg hann á skrivstovu hansara í Sameindu Tjóðum. Hann tyktist ógvuliga niðurboygdur undir samrøðu okkara. Meðan hann hugdi út gjøgnum vindeygað yvir New York, segði hann róliga: »Eg havi onga vón um ein heimsfrið, ið varar. Vit hava roynt so nógv, og vit hava mistikið okkum stórliga«. So tagdi hann eina løtu, hugdi á meg og helt fram: »Um heimurin ikki kemur at uppliva eina andaliga endurføðing innan nærmastu komandi árini, er sivilisatiónin dømd«.

Hetta er tað ættarliðið, sum má fara gjøgnum eldin. Hetta er ættarliðið, sum magasin »Holiday« umrøddi sum »undir byrsumúlanum«. Hetta er tað plágaða ættarliðið. Hetta er ættarliðið, sum er ætlað at liva í kreppum, vanda og frykt og deyða. Vit eru sum deyðadømd menniskju og bíða eftir tí ásetta degnum. Vit eru greið yvir, at nakað fer at henda. Vit vita, at tað ikki kann halda fram sum nú. Skjótt eru vit komin til endan. Tað má skjótt verða ein broyting.

Jens Paul Satre, tann franski eksistensialisturin, hevur sagt: »Tað er eingin útvegur frá tí menniskjansliga dilemma«. Sir Winston Churchill tosaði soleiðis um heimskreppuna: »Trupulleikar okkara eru longur burtur, enn vit røkka«. Logarnir sleikja upp um allan heimin - takið er við at geva eftir - menniskjað er kringsett av einum eldi, tað ikki sjálvt hevur tamarhald á.

**Fólkavøkstursins eldur**

Tann ógvusligi fólkavøksturin ger okkum ráðvill, og vøksturin ræðir okkum. Hetta dilemma hevur verið analyserað av tí enska søgugranskaranum Arnold Toynbee, sum trýr, at um vit fáa ein bardaga við atomvápnum, so vilja tað verða alt og fá menniskju eftir at halda fram við sivilisatiónini. Hinvegin vil lívið áhesi planetini ikki vera at halda út og ómøguligt, um vit ikki fáa ein tílíkan bardaga. Statistikkurin talar sítt mál, tá vit hugsa um, hvussu stórt føðingaprosentið er í mun til deyðsprosentið.

Við byrjanini av tí kendu søguni roknar ein við, at samlaða fólkatalið í heiminum var umleið 125000. Á Kristi tíð var fólkatalið í øllum heiminum einans tveir triðingar av núverandi fólkatali í USA (ár 1971). Vøksturin hevur verið so ógvusligur síðan, at 3% av øllum menniskjum, sum hava livað á jørðini síðan søguliga teljingin byrjaði, liva á jørðini í dag (1971). Við endan av hesi øldini = ár 2000, vil fólkatalið í heiminum vera meira enn seks og eina hálva milliard.

Úrslitini av hesi eksplosiónini eru fantastisk. Eftir seks ættarliðum vil USA, um økingin heldur fram sum nú, hava níggju milliardir menniskju, tríggajr ferðir so nógv sum í øllum heiminum í dag. Úrslitið verður, at USA verður ein einasti stórur býur. Vísmenninir tosa nú faktiskt um eina ecumenopolis ella ein veldugan metropol. Vit kunnu hugsa okkum, hvørji óhugnalig perspektiv, sum liggja framman fyri okkum, um henda eksposiónin skal halda fram.

Heimurin sendur yvir fyri bæði einum biologiskum og einum politiskum trupulleika. Eru vit før fyri at hava vilja, vísdóm og forstáilsi til at taka upp bardagan móti tí velduga fólkavøkstri? Hvørki núverandi ella framtíðar skema fyri ein sosialistiskan ella mannavinarligan part av ríkidøminum í heiminum hava nakað at siga, um tað eru fleiri menniskju, enn virðir at býta. Menniskjuni sjálv eru altso vorðin vápn til egnan undirgang.

***Kelda:** Billy Graham, »Verden i Flammer« 1971. Umsett hevur Símum Pauli Jacobsen í Vestmanna*

## Sigarettanna verjar ella verjar sigarettarinnar?!

**EYÐUN Á BORG**



Tey komu kropp á kropp at verja sigaretttollfrælsið: maður, kvinna, serfrøðingar, roykfrændur á tingi og í landsstýri og onnur!!

Tey vildu vera við, at ferðavinnan og kanska okkurt annað eisini neyvan hóraðu undan, um sigarettin, stóri týnarin, ikki fekk tollfrælsi.

Tú øtast, harmast, skammast.

Samstundis koma tíðindini um, at vit ikki hava ráð til fyribyrgjandi tiltøk móti lívmóðurhálskrabba.

Tú gerst næstan málleysur.

Roykloysi er mannarættindi!

Á Borg á Argjum mannarættindaaftan 2008

**Við roykloysiskvøðu**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.